## Á flog í mai

Vanlukkan við rúmdarferjuni »Columbia« tann 1. februar í 2003 gjørdi, at amerikanarar góvust við ferjuflúgvingini, men nú ætla teir at royna aftur.

Í síðstu viku varð rúmdarferjan »Discovery« flutt til útskjótingarstøðina á Cape Caneveral í Florida, haðani hon ætlandi skal sendast út í rúmdina eina ferð ímillum tann 15. mai og tann 3. juni. Tað er longu avgjørt, at ein kvinna verður skipari á ferðini. Tað er Eileen Colins, og umframt hana verða fimm amerikanarar og ein japani við »Discovery«.

Sjey rúmdarmenn doyðu, tá »Columbia« sprongdist, og kanningar hava avdúkað, at eitt petti av fóðringini datt av ferjuni og niður á annan vongin, so ein riva kom í hann. Tað hendi longu undir útskjótingini, og tá ferjan kom aftur inn í atmosferuna á veg niðuraftur, sluppu gass og hiti inn ígjøgnum rivuna, so ferjan sprongdist. Síðani hevur rúmdarumsitingin NASA brúkt einar sjey milliardir krónur til at bøta um fóðringina, so slíkt ikki skal henda aftur, skrivar AP.

## Sharon í Texas

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, var í gjár í Texas, har hann hitti George W. Bush, forseta. Hetta er tíggjundu ferð, at Sharon er í USA, síðani hann gjørdist forsætisráðharri, men hetta er fyrstu ferð, at Bush hevur boðið honum til Texas.

Trygdartiltøkini vóru sera umfatandi, tá Sharon kom til býin Waco sunnukvøldið. Allastaðni vóru løgreglumenn og trygdarmenn at síggja, og lastbilar vóru settir tvørtur um vegirnar fyri at steðga ferðsluni við hotellið, sum Sharon býr á. Fundurin við Bush var á garðinum, sum forsetin hevur í Crawford, ið er einar 25 kilometrar frá Waco.

Høvuðsmálið á fundinum ímillum Sharon og Bush var ísraelska afturtøkan úr Gaza-geiranum. Bush hevur fyrr sagt, at hann tekur undir við avgerðini, men hann hevur samstundis sett seg upp ímóti, at niðursetubygdirnar á Vestara Áarbakka verða bygdar út.

## Tríburðar eita eftir pávanum

Jóhannes Páll pávi Annar er longu uppkallaður. Eini hjún í Pólandi, sum fingu tríburðar í síðstu viku, gjørdu alt fyri eitt av at geva teimum trimum dreingjunum navn eftir pávanum. Ein teirra hevur fingið navnið Karol, sum pávin æt, og hinir báðir eita Jan og Pawel, sum svara til nøvnini Jóhannes og Páll.

Foreldrini og teir tríggir dreingirnir búgva í býnum Byton har suðuri í Pólandi. Mamman, Kinga Adamiec, sigur sambært BBC, at hon vildi sleppa at heiðra tann gamla pávan við at geva dreingjunum navn eftir honum.

Sambært polsku tíðindastovuni PAP hevur ein annar smádrongur eisini fingið navn eftir pávanum. Hann varð føddur í einum sjúkrabili beint við biskupshúsini í býnum Krakow tann 2. apríl. Jóhannes Páll pávi var prestur og erkabiskuppur í Krakow, áðrenn hann gjørdist pávi.

## 500 umsóknir til hvørt starv

Tá flogfelagið SAS herfyri søkti eftir tíggju fólkum, fekk felagið ikki færri enn 5.000 umsóknir.

Leiðslan í SAS sigur, at meiri enn 3.000 sviar eru ímillum umsøkjararnar. Hini eru 1.100 danir og 900 norðmenn. Í fyrsta lagi er ætlain at viðgera umsóknirnar, soleiðis at umleið 100 umsøkjarar eru eftir. Tey skulu so til nakrar serligar royndir, og so verða 24 tikin burturúr. Tey sleppa so at royna seg í átjan mánaðir, og ikki fyrr enn tá verða tey seinastu tíggju sett í starv, skrivar Aftenposten.

SAS leggur so stóran dent á at finna tey røttu ímillum allar umsøkjararnar, at sjálvur aðalstjórin, danin Jørgen Lindegaard, er við til at velja tey seinastu burturúr.

UTTAN ÚR HEIMI

# Vænta ein svartan páva



*Nigeriski kardinalurin Francis Arinze (hm. á myndini) verður hildin at hava bestu møguleikarnar at taka við eftir Jóhannes Páll páva Annan*

**Fleiri vænta, at tann svarti kardinalurin Francis Arinze hevur teir bestu møguleikarnar at vinna pávavalið**

PÁVAVAL

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Seinastu dagarnar hava fleiri veddingarfyritøkur veddað, hvør fer at taka við eftir Jóhannes Páll páva. Serliga í Írlandi er áhugin fyri pávavalinum stórur, og har eru fólk ikki í iva um, at nigeriski kardinalurin Francis Arinze hevur teir bestu møguleikarnar at gerast tann næsti pávin.

Næstbestu møguleikarnar hevur erkabiskuppurin í Milano í Italia, Dionigi Tettamanzi, og triðbestu møguleikarnar hevur meksikanski kardinalurin Rodriguez Maradiaga. Minstu møguleikarnar hevur egyptiski kardinalurin Stephanos Ghattas.

Tað verður eisini gitt, hvat pávanavn næsti pávin fær. Summi vænta, at tað verður Jóhannes Páll Triði, men tað er eisini hugsandi, at hann fær navnið Benadikt. Onnur nøvn, ið verða nevnd, eru Urban, Felix og Boniface.

# Herferð ímóti Hillary

**Í USA eru republikanararnir farnir undir eina herferð, sum skal forða fyri, at Hillary Clinton skal gerast fyrsta kvinnan í amerikanska forsetaembætinum**

USA

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



*Hillary Clinton. Nú royna republikanararnir í New York at forða fyri, at hon kann gerast tan næsti amerikanskir forsetin*

– Tað týdningarmesta, sum tú eg og kunnu gera tey bæði næstu árini, er at steðga Hillary Clinton.

Orðini eru úr einum brævi, sum formaðurin hjá republkanarunum í New York, Stephen Minarik, hevur skrivað, og sum hevur til endamáls at savna pening til eina herferð ímóti Hillary Clinton, sum er demokratiskur senatorur í New York.

Í brævinum, sum er sent republikanskum flokslimum og einstaklingum og fyritøkum, ið plaga at lata republikanarunum fíggjarligan stuðul, skrivar Stephen Minarik, at hann hevur sett sær fyri at halda eygað við Hillary Clinton og at avdúka lygnir hennara.

Hillary Clinton hevur boðað frá, at hon stillar up til senatsvalið í New York næsta ár, og republikanararnir stúra fyri, at senatsembætið bara er ein lopfjøl, og at hennara veruliga mál er at stilla upp á forsetavalinum í 2008.

Eygleiðarar siga við tíðindastovuna AP, at trupulleikin hjá republikanarunum er, at teir hava einki valevni at stilla upp ímóti Hillary Clinton, um hon ger av at stilla upp á næsta forsetavalinum, og teir hava heldur ongan, sum kann bjóða henni av á senatsvalinum, siga teir. Republikanski guvernørurin, George Pataki, hevur sagt, at hann stillar ikki upp til Senatið. Hann verður annars nevndur sum møguligt forsetavalevni hjá republikanarunum í 2008.